# Løgmaður røða á ráðstevnu um Arktis í Íslandi

**Jan Müller**

15.09.2013 - 20:19

Oljan.fo

Føroyar verða umboðaðar av eitt nú Kaj Leo Johannesen, løgmanni, tá felagsskapurin "Arctic Circle" heldur sína fyrstu ráðstevnu um Arktis í Reykjavík í døgunum 12. til 14. oktober. Endamálið við hesi ráðstevnuni er at fáa ein dialog í lag og byggja sambond millum íbúgvar, politikarar, vinnulív, granskarar, áhugafelagsskapir oo., sum hava eitthvørt tilknýti til Arktis.

Talan er um at víðka um verandi samskifti og samstarv, sum longu er í Arktiska Ráðnum og øðrum stovnum, har Arktis verður umrøtt. Ætlanin er, at hetta tiltakið, sum er tað fyrsta av sínum slag og sum hesaferð fer fram í konserthøllini í nýggju og víðagitnu Hørpuni í Reykjavík, skal haldast í ymsum arktiskum londum á hvørjum ári.

Millum høvuðsrøðararnar á ráðstevnuni eru íslendski forsetin, grønlendski landsstýrisformaðurin og Føroya løgmaður. Eisini verða kendir politikarar, vísindafólk og granskarar úr fleiri londum við.

Kend altjóða andlit verða eisini við umvegis fjarsamskifti, eitt nú Al Gore, fyrrverandi varaforseti í USA og Hillary Clinton, fyrrverandi uttanríkisráðharri í USA. Eisini fyrrverandi bretski forsætisráðharrin, Tony Blair luttekur á sjálvari ráðstevnuni saman við fyrrverandi franska uttanríkisráðharranum.

Enn ein føroyingur verður ein av røðarunum á høvuðstiltakinum. Tað er Rúni M. Hansen, sum stendur á odda fyri arktisku deildini hjá Statoil.

Harumframt verða Sigurð í Jákupsstovu, rektari á Fróðskaparsetrinum og Beinta í Jákupsstovu, doktari við við framløgum á tveimum av mongu tiltøkunum á ráðstevnuni.

Sum skilst eru fleiri føroyingar bodnir við til ráðstevnuna.


PLENARY SESSION 1: OPENING SESSION
PEAKERS:
Ólafur Ragnar Grímsson, *President, Iceland*
Aleqa Hammond, *Premier, Greenland*
Kaj Leo Holm Johannesen, *Prime Minister, Faroe Islands*
Leona Aglukkaq, *Chair, Arctic Council, Canada [invited]*
Lisa Murkowski, *U.S. Senator*

VIDEO MESSAGES:
HSH Prince Albert II of Monaco *[invited]*
Hillary Rodham Clinton, *Former Secretary of State, United States [invited]*
Al Gore, *Former Vice President, United States, and Nobel Laureate*






SION 9: ARCTIC ENERGY COOPERATION

*rgy Future: Iceland and Greenland as Examples of Cross-Border Cooperation*
vit, Verkís Consulting Engineers and Landsvirkjun Power as well as representatives from

*blems and Possibilities*

son, *Chairman, Eykon Energy [invited]*
*e President, Arctic Unit, Statoil*
*esident, International Council on Mining and Metals (ICMM)*
m Total, Gazprom, Shell and CNOOC

*rman, Cambridge Energy Research Associates (CERA) [invited]*